## Spyr um sjálvmorð

Heidi Petersen, løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin spyr í skrivligum fyrispurningi Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann við mentamálum, um landsstýrismaðurin hevur tikið ítøkilig stig til tess at veita næmingum, sum eru í kreppu vegna sjálvmorðshugsanir og –royndir og foreldrum teirra, hjálp og ráðgeving. Fyrispurningurin kemur eftir, at ein kanning, sum er almannakunngjørd í summar, vísir, at av øllum 8.-floks næmingum í fólkaskúlanum hevur tíggjundi hvør roynt sjálvmorð av sálarligu sjúkuni eftirvirkandi strongd.



## Mbf.fo nýtt andlit

MBF hevur fingið nýggja heimasíðu. Tíðin var nú komin til at gera ein nýggja og meiri nýmótans heimsíðu, ið kann virka sum ein kunningardepil fyri øll, ið hava áhuga og brúk fyri at vita , hvat hendir á økinum hjá MBF. MBF strembar eftir, at mbf.fo skal verða eitt tíðandi talirør út í samfelagið. Á síðuna koma viðmerkingar til politikk á brekaðøkinum, nýtt frá grannunum í Norðanlondum, og annars greinar og viðmerkingar, sum hava við brek at gera. Limafeløgini í MBF eru øll at finna á heimasíðuni.

# Ísland væl umboðað

**- Okkara uppgáva er at finna nýggjar keyparar og "pleyga" teir gomlu. Vit hava eisini til uppgávu at umboða tann partin av okkara ferðavinnu, sum ikki er við á Vestnorden Travel Mart, sigur Unn á Lað, ið starvast hjá Samvit**



*- Tað er eisini okkara uppgáva at hjálpa og vegleiða okkara ferðavinnu, tá hon hevur tørv á hesum, bæði teimum, sum við eru á Vestnorden Travel Mart og teimum, sum ikki eru við, sigur Unn á Lað*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**FERÐAVINNA**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Unn á Lað umboðaði Samvit, tá vit vitjaðu á Vestnorden Travel Mart týsdagin.

Stjórin á Samvit, Elin Heinesen, hevði aðrar uppgávur úti á gólvinum hesa løtu, har hon fylgdist við útlendskum gestum, sum komnir vóru til landið.

### Nógv úr Íslandi

Unn á Lað sigur, at av teimum tilsamans 113 útbjóðarunum ella seljarunum á básunum, er størri helmingurin úr Íslandi.

- Ísland hevur nógv at bjóða, og tey leggja stóran dent á at kunna um síni ferðavinnutilboð. Soleiðis eru eisini ymisk hotellir úr Íslandi og ymiskir útferðarmøguleikar við á teirra básum.

Unn heldur, at bæði Føroyar og Grønland eisini eru væl umboðað, hóast básarnir ikki eru líka nógvir í tali sum teir íslendsku.

Hon sigur, at áhugin fyri Grønlandi sum ferðamannalandi er vorðin stórur, tí landið selir seg sjálvt, sum hon tekur til.

- Sum ferðaskrivstova hava vit eisini til uppgávu at umboða teir møguleikar, vit hava í Føroyum, sum ikki eru við á stevnuni.

Hon sigur, at sum heild er uppgávan hjá Samvit á ferðavinnustevnuni at leita eftir nýggjum keyparum, men ikki minst at pleyga teir gomlu.

### Betur skipað

Unn á Lað fegnast eisini um, at ferðavinnan í Føroyum er vorðin betri og betri skipað, sum árini eru liðin, og hon fegnast eisini um tann áhuga, sum er millum útlendsku keyparar fyri Føroyum.

- Fleiri av seljarunum og keyparunum, sum við eru, hava verið við áður, men tað eru eisini tey, sum eru við á stevnuni fyrstu ferð. Soleiðis er eisini onkur føroyskur útbjóðari við fyrstu ferð, og tað er eisini okkara uppgáva at hjálpa og vegleiða okkara ferðavinnu, tá hon hevur tørv á hesum.

Unn á Lað sigur, at tað er ein samstarvsnevnd millum Føroyar, Ísland og Grønland, NATA, sum stendur aftan fyri Vestnorden Travel Mart, og vanligt er, at sjálv fyriskipingin verður latin onkrum útbjóðara í vertslandinum.

- Hesaferð er tað so Green Gate Incoming, sum tekur sær av øllum tí praktiska, sigur hon.

### PRE og POST

Longu í februar mánaða, sum stevnan er tíðliga um heystið, verður hugt eftir, hvørjir framsýnarar skulu verða á stevnuni, og hvørjir keyparar úti í heimi skulu bjóðast við.

- Meðan Green Gate Incoming skipar fyri tí praktiska í sambandi við sjálva stevnuna, taka vit okkum av tí, sum rópt verður PRE-túrum og POST-túrum, sum eru túrar, ið ávikavist standa keyparum í boði fyri og eftir Vestnorden Travel Mart.

Hon vísir á, at hesaferð vóru 5 keyparar við á PRE-túrinum, 3 úr Niðurlondum, ein úr Ruslandi og ein danskur journalistur.

- Túrurin vardi frá leygardegi til mánadag, sum stevnan byrjaði alment mánakvøldið. Vitjað varð í Suðuroy, á Viðareiði, fram við Gjógv og uppi á Sornfelli, sigur Unn á Lað.




*Vestnorden Travel Mart er eitt stórt og afturvendandi ferðavinnutiltak. Hetta skundar eisini undir tey, sum bjóða seg fram á ferðavinnuøkinum, at hava øll síni tilboð fyri komandi ár klár í góðari tíð, so keyparar úti í heimi neyvt siggja, hvørji tilboðini eru*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# aferð

útlandinum eitt gott høvi at taka hesi heim við sær.

- Tað er ikki vanligt at hoyra, at so nógv verður selt á sjálvari stevnuni, men hetta er eitt gott grundarlag hjá teimum, sum bjóða seg fram, at samskifta um møguleikar.

Stjórin í Green Gate Incoming vísir á, at felagið saman við Atlantic Airways hevur gjørt snotuliga faldaran FlyFaroe 2008, sum liggur frammi á stevnuni.

- Soleiðis hava útbjóðarar síni ferðavinnutilboð klár til seljararnar at skoða og meta um, leggur hann aftrat.

Marni Hjallnafoss sigur, at skipanin við "workshop" er hon, at tú sum útbjóðari kanst fáa avtalu í lag við tilsamans 32 keyparar á stevnuni.

- Tá er fullteknað og pláss er ikki fyri fleiri avtalum. Hinvegin kunnu útbjóðarar hava tveir básar, sum eitt nú Atlantic Airways hevur, og tá kunnu uppaftur fleiri avtalur gerast, sigur hann.

Stjórin fegnast um, at tað hesaferð var túrurin hjá Green Gate Incoming at skipa fyri Vestnorden Travel Mart.

**Vit hava meira um Vestnorden Travel Mart í blaðnum í morgin**